## DAGSINS MEINING

# Jól Luk 2, 1-14

Táið eitt menniskja liggur sjúkt, og sjúkan hóast alt, hvat læknarnir gera, verður verri og verri, til tað at endanum tykist øllum greitt, at nú stundar tað móti deyðanum, og tað so álíkavæl hendir, at sjúklingurin knappliga fer at batna, so plagdu teir lærdu at siga, at nú var kreppan yvirstaðin.

Jólini eru kreppan í árinum. Síðani 21. juni, táið nátt og dagur tóktust okkum líka, hevur tað gingið aftur á hondina við degnum líka til 21. desember, har ein illveðursdag náttin hevur so nógv vald hjá okkum, at ljós má brenna allan dagin. Men so fer tað aftur at lýsna, og alt á foldum fer at gleða seg til sól og summarhita.

Jólini eru kreppan í verðaldarsøguni. Jesu føðing ella fylling tíðarinnar, sum Paulus so rámandi kallar hendingina, er tann miðdepilin í verðaldarsøguni, sum alt snýr seg um. Størsti parturin av heiminum býtur tíðina sundur í tíðarskeiðini undan og eftir føðing Krists. Ei undur í. Mannættin var smokkað so djúpt niður í myrkur vónloysins og syndarinnar, og ótti nívdi henni, so eingin visti sær bjarging, men tá var tað ljósið tendrað, sum skeint yvir allan heimin til at lýsa fyri teimum, sum situr í dali deyðaskuggans og myrkurs. Tá ljóðaði tað til seyðamenninar: Óttist ikki, tí tykkum er í dag ein frelsari føddur.

Jólini kunnu eisini verða ein kreppa fyri tað einstaka mannahjarta. Ert tú sokkin so djúpt í synd, sorg og deyðaangist, sum nakað menniskja kann søkka, har tú ert komin á botn og hevur lært at kenna ta djúpu neyð, har tú ikki kanst hóma ein einasta sólargeisla, – hoyr tí, hvussu jólaklokkan kimar fyri fylling tíðarinnar, tær til sálarbót. Hátíðin fyri føðing Krists kann eisini gerast tann stóra broytingin í lívi tínum, so at tú mitt í bølamyrkrinum kann hóma ljósið av himni.

Á hesi stóru hátíð ársins, søgurnar og lívsins, møta vit tveimum kongum: Augustus keisara í Róm og hinum Harra Jesu Kristi í Dávids staði.

Augustus situr á trúnu síni í glæstriborgni í Róm. Vit kenna andlit hansara av standmyndum frá samtíðini: eitt vakurt sterkt andlit, ið sýnir okkum ein mann við sterkum vilja, ein mann, sum er vanur at sigra og sum ikki letur seg boyggja, hvørki av vinum ella fíggindum. Augustus var heimsins mætasti maður. Hann var tilbiðin eins og gudur, og orð hansara var lóg. Hann sendi júst tá boð út um, at allur heimurin skuldi skrivast í manntal, men hann visti einki um tað barnið, sum júst tá var borið í heim, men vit høvdu vitað lítið meira um Augustus í dag, enn vit vita um hinar rómversku keisararnar, um ikki hetta barnið var føtt, meðan hann var keisari.

Hetta lítla barnið er hin kongurin, sum skuldi gerast so nógv meira kendur enn Augustus. Hvussu Jesus hevur sæð út vita vit ikki. Men sambært Jesaia profet, so skal hann ikki hava verið glæsiligur á at líta, so vit vegna útsjónd hans kunnu finna hugna í honum.

Men vita vit einki um útsjónd hansara, so vita vit so mikið meira um lív hansara og virki, um lyndi hansara og vilja. Hann var spaklyntur og eyðmjúkur av hjarta. Hann gjørdi ikki synd, og svik var ikki funnið í munni hans. Hann hjálpti øllum, sum heittu á hann, og hann lærdi okkum, at alt tað vit vilja, at menniskju skulu gera móti okkum, tað skulu vit eisini gera móti teimum. Hann hin reini og syndafríi doyði fyri tínar syndir.

Kreppa ella ikki, so kunnu jólini verða tey kyrrindi í lívi tínum, har rákið vendir hart frá vandasjógvi móti heimastrond.

Gævi so var hjá øllum, ið hetta lesa og bert kenna heimsins kong, so fáa vit øll eini gleðilig jól.

## NØVN Í VIKUNI

### Sigurd Berghamar 90 ár



Ígjár fylti Sigurd Berghamar í Havn 90 ár. Hóast hann er føddur í Havn og hevur búð í Havn meginpartin av lívinum, roknar hann seg sum klaksvíking og heldur enn við KÍ.

Trý ára gamal flutti Sigurd við foreldrunum til Klaksvíkar, har hann vaks upp. 21 ára gamal fór hann aftur til Havnar, har hann gjørdist skrivstovumaður burturav.

Í Sjóvinnubankanum var hann eitt skeið, men tá Esmar Fuglø fór at selja olju, fór Sigurd í starv hjá honum á tí felagnum, sum seinni bleiv til Esso og nú Statoil. Arbeiðið á oljusøluni gjørdist hansara lívsstarv.

Sigurd giftist í 1938 við Onnu Katrinu Hansen, nevnd Tinna, av Toftum. Tey fingu fýra børn. Elst er dóttirin Gunnvør, síðan Øssur, Rúna og Erla. Systrarnar búgva allar tríggjar í Havn, meðan Øssur býr í Keypmannahavn.

Sigurd Berghamar er eisini kendur sum rithøvundur og skald. Hann hevur skrivað tvær bøkur. Fyrst Bibliúorðabókina og síðan bókina »Men Guð gav vøkst«, sum er um søguna hjá Brøðrasamkomuni í Føroyum.

Umframt hevur hann yrkt og umsett fleiri sálmar og sangir. Nakrir eru at finna í Sangbók Guðs fólks hjá Brøðrasamkomuni. Umframt eina rúgvu av veitslusangum og tílíkum.

Sigurd Berghamar hevur eisini verið nógv brúktur sum rættlesari. Í tí sambandi kann nevnast, at eitt av teimum størru arbeiðunum á tí økinum, hann var við til, var at rættlesa fyrstu føroysku bíbliutýðingina, sum kom út í 1947.

### Gjørdi skjótt av

Tann 23 ára gamli glyvramaðurin Hilmar Sam Lamhauge er settur sum leiðari á Statoil støðini í Saltangará.

Hilmar, sum tekur við eftir Rodmund Nielsen, komandi býráðsformann, hevur bara verið hálvtannað ár í starvi hjá Statoil, nú hann er biðin um at átaka sær starvið sum deildarleiðari í Saltangará.



Men tað ræðir hann ikki, at hann er ungur bæði á aldri og í starvi, sigur Hilmar Sam Lamhauge.

Eitt sindur hevur hann arbeitt á støðini, og hann hevur rættiliga gott fólk aftrat sær, letur hann at.

Handilskvinnurnar eru ógvuliga fyrikomandi og hjálpsamar, og bókhaldarin er mestsum eitt »vandrandi leksikon«, sum hann tekur til. So hann væntar ikki, at tað fer at standa á við góðum stuðli.

Hilmar Sam Lamhauge gjørdist matematiskur studentur á Kambsdali í 1998. Bæði áðrenn og aftan á tað hevur hann verið til skips, umframt at hann hevur smíðað hjá pápanum, sum er snikkari. Eisini hevur hann onkuntíð smíða saman við øðrum.

Hann kom á heysti í 1999 í starv á Statoil støðini í Saltangará, og verður á nýggjárinum, eftir áheitan, leiðari á støðini, tá verandi leiðarin, Rodmund Nielsen verður býráðsformaður.

## Tøkk

Vit vilja hervið takka øllum, sum gleddu okkum á gullbrúdleypsdegnum tann 10. desember 2000.

Eisini vilja vit ynskja øllum vinum og kenningum eini gleðilig jól og gott nýggjár.

**Elsa og Sigurd**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.







*Pyntið, sum Herman Christiansen hevur gjørt í miðbýnum í Vági, hevur sett sín heilt serliga jóladám yvir Vágsbygd*

# Jólahugni í Vági

JÓLAHUGNI
*Áki Bertholdsen*

Tey, sum hava koyrt ígjøgnum Vág hesa seinastu tíðina uppundir jól, hava lagt til merkis, hvussu ómetaliga hugnaligt miðbýurin er pyntaður. Ikki minst økið uppi við minnisvarðan mitt í bygdini, hevur sett sín serliga jóladám á Vágsbygd hesa tíðina.

Tað er Herman Christiansen, arbeiðsformaður hjá kommununi, sum hevur gjørt bæði reinsdjórið, “gleðilig jól” og hitt jólapyntið. Tað er gjørt burturúr stáli, sum hann hevur boygt og so eru perur settar uppí.

Herman sigur, at bestu lønina, hann hevur fingið fyri hetta, tað er, at so nógv fólk hava tosað við hann um, hvussu vakurt og hugnaligt, tey halda, at hetta er, ikki minst børnini og tað gleðir hann sera nógv, sigur hann. Vágbingar siga eisini, at tað hevur nógv fólk verið norðan av oyggj í Vági, sum fyrst og fremst eru komin at hyggja eftir jólapyntinum í miðbýnum.

Hann sigur, at næsta ár er ætlanin at gera enn meiri burturúr. Hann hevur eina ætlan, men vil ikki avdkúka hana enn, tí tað skal helst vera eitt sindur spennandi. Men hann sigur, at tað skal farast fram við varsemi fyri ikki at gera ov nógv av, tí so kann økið blíva yvirpyntað og oyðilagt. So tað, sum hann ætlar til næsta er, at leggja eitt sindur afturat og so at pynta meiri eftir vegnum o.s.fr.


